## UTTAN ÚR HEIMI

## Forðaði fyri heimsbardaga

Fráfarni forsetin í Georgia, Eduard Sjevardnadse, vil vera við, at Vesturheimurin hevur svikið seg. Tað sigur hann í samrøðu við bretska blaðið The Daily Telegraph.

– Eg var ein av teimum dyggastu stuðlunum hjá amerikonsku stjórnini. USA fekk mín fulla stuðul í Irakmálinum. Eg dugi ikki at greiða frá tí, sum nú er hent, sigur Sjevardnadse. Hann vil eisini vera við, at hann sum sovjetskur uttanríkisráðharri bjargaði heiminum undan einum kjarnorkukríggi, men at Vesturheimurin sveik hann, tá ófriður tók seg upp í Georgia aftan á tjóðartingsvalið fyri fýra vikum síðani.

– Var kalda kríggið ikki endað, høvdu vit fingið ein triðja heimsbardaga. Men vit bjargaðu heiminum. Eg sigi ikki, at eg gjørdi tað einsamallur, men eg hevði ein av teimum týdningarmiklu leiklutunum. Sovjetsamveldið valdi ikki at knúsa solidaritetsrørsluna í Pólandi, har broytingarnar í Eysturevropa byrjaðu, sjálvt um vit høvdu 40.000 stríðsvognar í Evropa tá, sigur tann 75 ára gamli fyrrverandi georgiski forsetin.

## Vend komin í búskapin

Felagsskapurin fyri búskaparligum samstarvi og menning, OECD, sigur í einari nýggjari frágreiðing, at sjónligur vøkstur er í búskapinum hjá teimum 30 limalondunum.

OECD væntar, at búskaparvøksturin í USA verður 6 prosent í seinna hálvári í ár, 4,2 prosent næsta ár og 3,8 prosent í 2005. Í ES-londunum verður vøksturin í ár 0,7 prosent, næsta ár 1,9 prosent og 2,5 prosent í 2005. Leiðandi búskaparfrøðingurin hjá felagsskapinum, fransmaðurin Jean-Philippe Cotis, minnir samstundis ES-londini á, at tað er neyðugt at skerja hallið á fíggjarlógini, tí stórt hall kann forkoma framburðinum, sigur hann. Sum er dugir hann ikki at síggja, at londini kunnu sleppa av við hallið í bræði, verður einki munagott gjørt.

Norsku politikarnir fáa somu ávaring. Annars væntar OECD, at búskaparvøksturin í Noregi verður 0,5 prosent í ár, men 2,75 prosent næsta ár. Men norsku politikararnir mugu leggja dent á at skerja tær almennu útreiðslurnar, sigur Jean-Philippe Cotis við Aftenposten.

## Færri fremmand

Tiltøk hjá bretsku stjórnini hava havt við sær, at talið á útlendingum, sum leita sær friðskjól í Bretlandi, er minkað eina helvt, skriva bretsk bløð.

Innanríkisráðið hevur ikki almannakunngjørrt tey seinastu tølini enn, men hildið verður, at umleið 50.000 útlendingar eru komnir til Bretlands í ár at biðja um friðskjól. Í 2002 var talið tvær ferðir so stórt. Gongdin er úrslitið av fleiri tiltøkum, sum stjórnin setti í verk. Andstøðan fanst í fjør hvassliga at Tony Blair, forsætisráðharra og stjórnini og kravdi, at okkurt varð gjørt fyri at avmarka talið á fremmandafólki, sum komu til Bretlands.

Í einari grein í blaðnum The Guardian nú um dagarnar skrivaði David Blunkett, innanríkisráðharri, nú fáa bretsku myndugleikarnir ikki fleiri umsóknir um friðskjól enn myndugleikarnir í hinum ES-londunum. Hann legði afturat, at í dag verða umsóknirnar viðgjørdar nógv skjótari enn fyrr.

## Dýrir svartkalvar

Reiðaríið hjá norska fiskiskipinum "Veidar" hevur játtað at gjalda myndugleikunum 300.000 krónur í bót fyri ólógligan fiskiskap.

Sunnmøreposten skrivar, at skipið hevur brotið veiðireglurnar ikki minni enn seks ferðir. Sambært blaðnum hevði skipið loyvi at hava tíggju prosent av svartkalva sum hjáveiði, men kanningar hjá fiskiveiðieftirlitinum avdúkaðu, at skipið hevði nógv meiri svartkalva enn loyvt.

Á tí eina túrinum hevði "Veidar" átta tons av svartkalva, sum skuldu eitast at vera hjáveiða, men tá lastin bleiv kannað, svaraði svartkalvin til heili 97 prosent av tí, sum var í lastini.

# Valið loysir neyvan nakað




*Formaðurin í Sinn Fein, Gerry Adams, uttan fyri eitt valhølið mikudagin. Flokkur hansara hevði framgongd, men tað høvdu teir víðgongdu protestantarnir eisini*

**Norðurírar hava valt nýtt tjóðarting, men tingarbeiðið byrjar neyvan í bræði.**


NORÐURÍRLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


Sum væntað høvdu teir víðgongdu flokkarnir á báðum síðum framgongd á valinum í Norðurírlandi, og eygleiðarar eru á einum máli um, at tað er óheppið fyri ta politisku framtíðina í landspartinum.

Í gjár var ikki liðugt at telja atkvøðurnar, men sambært kanningum hevði tann politiski vongurin hjá IRA, Sinn Fein, vunnið meirilutan av teimum katólsku atkvøðunum og var sostatt vorðin størri enn tann hóvligi arbeiðaraflokkurin.

Á tí protestantiska vonginum hevði flokkurin hjá tí víðgongda prestinum Ian Paisley stóra framgongd, og ein kanning vísti, at hann og flokkurin hjá David Trimble, fyrrverandi fyrstaráðharra, lógu stavn um stavn. Kortini varð roknað við, at tann meiri hóvligi Trimble hevði fingið fleiri atkvøður.

Bretska stjórnin sett norðurírska sjálvsstýrið úr gildi í fjør, og valið mikudagin skuldi rudda slóð fyri at endurskipa tað. Men eygleiðarar í Belfast siga, at framgongdin hjá teimum víðgongdu flokkunum ger tað næstan ómøguligt at fáa nakað skipað politiskt arbeiði.

Harafturat vísti tann lítla valluttøkan, at nógvir norðurírar hava mist vónina um, at tað yvirhøvur ber til hjá protestantum og katolikkum at samstarva, siga eygleiðarar við BBC.

# Vilja ikki hava oljuvinnu á góðum fiskileiðum

**Ein meiningakanning í Noregi vísir, at meirilutin vil ikki hava oljuvinnu í Lofoten.**


OLJA OG FISKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


Júst sum norsku politikararnir umhugsa at loyva oljuleiting við Lofoten og í Barentshavinum, vísir ein meiningakanning, at flestu norðmonnum dámar lítið at loyva oljuvinnu á einari so týðandi fiskileið.

Munurin er tó ikki stórur. 40 prosent av teimum spurdu eru ímóti, at oljufeløgini sleppa at seta borin í undirgrundina í Lofoten, 38 prosent halda tað vera í lagi, og hini 22 prosentini vita ikki.

Tað var Heimsnáttúrugrunnurin WWF, sum skipaði fyri kanningini, og aðalskrivarin, Rasmus Hansson, heldur, at úrslitið er nóg týðiligt. Hann ásannar, at munurin er ikki stórur, men vísir á, at tá norðmenn atkvøddu um limaskap í ES, var munurin ikki størri, men at stjórnin í Oslo kortini helt hann vera nóg stóran til at taka avgerð eftir. Tað eigur tí eisini at galda í hesum førinum, sigur Rasmus Hansson við norska útvarpið.




































